**TIL SØLU**
Eitt føroyskt hondbundið dupult stórt sjall, úr føroyskum tógvi. Kann brúkast til føroyska kvinnubúnan.
*Tlf. 272469*

**KONFIRMATIÓNSKJÓLI**
viðjakka, str. 34, Lilly model. Bert brúktur einaferð.
*Tlf. 448714/266798*

**BÚNI HJÁ HAVNAR FIMLEIKAFELAG**
stødd XS til sølu fyri kr. 300,-
*Tlf. 313979*

**YNSKIST!**
Er tað nakar sum hevur einar brúðarskógvar std. 36-37 til sølu? So vinarliga ring
*tlf. 254889/447975*

**BRÚÐARKJÓLI TIL SØLU**
Ein brúðarkjóli stødd 42/44 til sølu fyri 5000 kr. Kjólin er 100% thaisilki, við broderaðum rósum í toyinum. Modelli er frá Oscar DeLarente og er sera einkult. Kjólin hevur 3/4 ermar, hjartaformaða útskering í hálsinum og sleb og ein tilhoyrandi selskabstaska er við í keypinum. Kjólin er design-seymaður og er tann einasti av sínum slag í Føroyum.
*Tlf. 442099 ella 220561*

**KONFIRMATIÓNSKJÓLI**
við stroppum og blondujakka str. 36, Lilly model til sølu fyri 1.000,-kr.
*Tlf. 444462*

**SKÓTABÚNI**
KFUM skótabúni stødd 8 ár, belti og turriklæði til sølu fyri 500 kr.
*Tlf. 271884*

**KONFIRMATIÓNSKLÆÐIR TIL DRONG**
Buksur st. 33, skjúrta st. 18 og butterfly til sølu fyri 500 kr
*Tlf. 316284 - 271884*

## Samband

**EINLIGUR MAÐUR**
40 ár, saknar kvinnu, hon má vera millum 30 og 40 ár. Eg havi egna íbúð. Skriva til Sosialin, box 76, 110 Tórshavn.
*Bill.mrk. 2020*

## Sjavs

**FRÁ TÓRSHØLL**
Sjavskapping verður týsdagin 15. februar kl. 19.00. Allir eittarir eru við í ár um ein góðan vinning. Øll vælkomin.
*Tórshøll*

## Súkklur

**SÚKKLA TIL SØLU**
Rocky Phantom í góðum standi fyri 1.000,- kr.
*Tlf. 422421*

**SÚKKLUR TIL SØLU**
Tríggjar brúktar súkklur eru bíliga til sølu. Ein 16 tumma barnasúkkla, ein 24 tumma súkkla við trimum gearum og ein 26 tumma súkkla við 21 gearum. Súkklurnar eru nýumvældar.
*Tlf. 375125*

**APRILIA RS50**
árg.98, til sølu fyri 10.000 kr. Knallertin er í rættiliga góðum standi. Ein rúgva av eykadeilum fylgja við. Áhugað kunnu ringja
*tlf. 747919*

**TIL SØLU**
Ein Aprilia Rx50 til sølu.
*Tlf. 257592*

**KNALLERT TIL SØLU**
Ein Yamaha fs1 knallert árg 79 til sølu sær gott út og er í góvum standi fyri 8000 kr nógv er skift út.
*Tlf. 561104*

**YAMAHA AEROX**
Yamaha Aerox. Verður seldur fyri 15 000 kr. Hevur ikki nummarplátu. Frá 2002. Koyrt cirka 5000 km.
*Ring á 264448*

**HONDA X8R TIL SØLU**
Nýsproytaður og koyrir sum fyrsta dagin.
*tlf. 258179*

**APRILIA RX TIL SØLU**
v/ nógvum eykadeilum.
*Tlf. 262906*

**TIL SØLU**
Thomas Quadro prutl frá 1998, til sølu fyir 4.000,-
*Tlf. 371225*

## Teldur

**GAMEBOY ADVANCE**
Eitt gameboy advance við ljósi, 4 spølum, Beyblade v force, Harry potter 2, Super mario bros de luxe og Pokemon blue. Bíliga til sølu.
*Tlf. 258790*

**PLAYSTATION SPØL**
4 Playstation spøl, Pong, Championship manager Quiz, True pinball og Beyblade til sølu fyri 100 kr. stk. ella øll fyri 300 kr.
*Tlf. 258790*

**TIL SØLU**
Skærm 20" kr. 750,- Skærm 21" kr. 950,- PC - god til hjemmekontoret (ok til Breiðband). PIII, 550Mhz, 384 Mb Ram, 12GB HD, 17" skærm m/højtt, netkort. Inkl. Windows & MS Office. kr. 2.200,- ISDN Modem. kr. 200,- ISDN telefon, Ascom Eurit22 kr. 200,-
*Tlf. 320828*

**SPØL TIL SØLU**
3 xbox spøl til sølu fyri 300 kr. stk. ella øll fyri 650 kr. Playstation II spæl Grand Teaft… fyri 400 kr.
*Tlf. 448097*

**XEROX KOPIMASKINU TIL SØLU**
God Rank Xerox 5317 på rullebord. Kopier både A3 og A4 fra magasin i størrelsen 64-156% Pris Kr. 2.500,-
*Tel. 210405, efter kl.16*

**HYGG HER!**
Eitt Game boy, við ljósi og 1 spæli. Fifa 2005, til sølu, er bert 1 mðr. gamalt.
*Tlf. 257983*

**FUJITSU-SIEMENS TIL SØLU**
2 ára gomul Fujitsu-Siemens telda til sølu: Pentium 4 1,7 GHz processor - 256 MB RAM - 19'' CRT skýggi - 40 GB harðdisk - CD-R/RW + DVD-rom. (2 drev) - Windows XP Pro Edition. Modem, netkort, tv-kort, Nvidia Geforce 2 MX/MX 400 grafikkort. V/ Adobe Photoshop 6.0, Anti-spyware forrit, Microsoft Office 2000 og fleiri øðrum forritum. Feit skúlatelda! Til sølu um hóskandi boð fæst.
*Pætur Magnussen, tlf 507102*

**IPOD MINI TIL SØLU**
Bláur ipod mini (eitt sindu skøvaður) mp3 spælari, við 535 songum og næstan 2GB frítt pláss + itunes, 2 headset, usb,firewire stikk! ladara og haldara fyri 1700 kr.
*Tlf. 273991*

**TELDA TIL SØLU**
2500+ MHz Barton processari, 512 MB DDR ram, Radeon 9000 family skermkort, CD-R-RW brennari, 17'' skermur, LAN 100 Mbit, tráðleyst internet kort. Flott lýsandi kabinett. Selist samlað fyri 7.500 kr.
*Tlf. 250297 ella 319604 Hjalti*

**TELDA TIL SØLU**
Intel celron 2.4 GHZ, 256 MB Ram, 20 GB Harddisk, 64 MB grafikkort, net kort, breiðband, USB 2.0, 15'' skermur, bíliga til sølu.
*tlf. 267471*

**PLAYSTAION OG 2 JOYSTICK TIL SØLU**
Fyri 500 kr.
*Tlf. 316284 - 271884*

## Tónleikur

**PUMPUORGUL**
Vakurt útskorið pumpuorgul við 2 messingljósastakum. Allir tangentar virka, men orglið má helst stemmast. Er uml 1,5 m breitt og tekur seg væl út sum stovumøbul. Myndir síggjast á www.123hjemmeside.dk/sofa
*Tlf. 522120*

**TIL SØLU**
Kawaiorgul v/ bonki bíliga til sølu.
*Tlf. 448878*

## Út- & Sjónvarp

**TIL SØLU**
Sera flottur DVD spælari, kann setast til surround. Nýprísur 6.000 kr. selist fyri 1.500,- vegna flyting.
*Tlf. 274545*

**TIL SØLU**
Eitt televarp til sølu fyri 700,- kr.
*Mobil 509005*

## Ymiskt

**DIGITAL CAMERA**
Eitt Konica digital camera 3.1 mega pixels, sum ongantíð er brúkt, nýprísur 1.495 kr. til sølu fyri 1.000 kr.
*Tlf. 258790*

**YMIST TIL SØLU**
Kamera: Spejlrefleks kamera, Nikon F5, Nikon blitz SB-28, spiralkabel SC-17 m.TTL, Nikon Circular Polar, Nikon R60, Sigma Obj. 17-35mm D Aspherical, Manual, fik stor service juni 2003. Kr. 14.000.
Herrerur, exklusiv TAG HEUER Monza Automatic. Hvid skive m. sort læderrem. Ikke brugt. Org. æske. Købt juli 2002, kr. 12.000.
Herrerur TAG HEUER, batteri dykkerur 200 mtr. model WT 1110, sort skive med dato og flot lænke. Kr. 4.500.
Herrerur Breitling Automatic Superocean Proff. Dykkerur 1524mtr. Meget flot mørkeblå skive med gummirem. Kr. 7500,-
Mares dykkermaske Maschera Lirica Tech/Nero Tech-black kr 400,-
Snorkel Technisub des.303440 US Pat. kr 100,-
Mares svømmefødder Plana avantitre blå, str. 42-43, kr450,- i alt 950,-
Salomon Inliner, str. UK10, EUR45. 4 hjul á 76mm 78A Salomon X-tr, ALU-skinne Powerarch 60 max 270mm DR85, virkelig god kvalitet, meget lidt brugt m få ridser, kr 800,-
Badminton ketsjere: Babolite satelite Kevlar 90gr. Som ny, 600.-
Yonex Carbonex8, den kendte, er som ny, pris 150,-
Pro Kennex Ceramic 858 kr. 100,-
Klapramme, HANSA, fejler intet. Mål: 36x31 cm. Kr. 100,-
Herrerur Casio C-801 Digital med lommeregner, dato, stopur, læderrem. 200,-
*mobil 220687*

**MYRKT SPÍSISTOVUBORÐ**
við 2 plátum + 6 stólar til sølu fyri 1.000,- kr.
*Tlf. 444621*

**GEORG JENSEN**
Georg Jensen jólaprýði at hava ljós í og hengja á træið til sølu vegna feilkeyp. Ring og fá meiri at vita.
*Tlf. 226252*

**KANNING**
av føroyskum hand- og listhandverki. Kunnandi fundur verður í Norðskála-Oyrar Skúla mikudagin 16. februar kl. 20.00. Kanningin er stuðlað av Mentamálaráðnum og Mentanargrunni Landsins og fevnir um allar virknar handverkarar og listhandverkarar í landinum. Skrá: Stutt frágreiðing um kanningina, vegleiðing viðvíkjandi spurnarbløðum, drekkamunnur og handverksprát.
*Føroya heimavirkisfelag / Randi S. Vang og Jónhild*

**TIL SØLU**
Kontainari 20 fót + bátavognur til stórar og smáar deksbátar.
*Tlf. 212317*

**LOPPUMARKNAÐUR**
verður í Sumbiar skúla leygardagin 19. februar frá kl. 14.00-17.00
*Skúlabørnini*

**VENJINGARBONKUR**
til sølu fyri 2.500 kr. Kann brúkast til nógv ymiskt.
*Tlf. 584422*

**KASSATÓL TIL SØLU**
3 ára gamalt Casio kassatól til sølu. Lítið brúkt.
*Tlf. 333014/226161*

**TIL SØLU**
Ein garasjuhurð av timbur við hurð í 200 cm h. x 243 cm b.
*Tlf. 283290/252383*

**TIL SØLU**
Ein sentralvarmaketil, lítið brúktur, til sølu.
*Tlf. 370545*

**SUNDA PENSIONISTAFELAG**
Onki hugnakvøld verður í februar.
*Nevndin*

**TIL SØLU**
Skrivimaskina: Gomul svørt Olympia frá 19??. Seymimaskina: Gomul svørt Pfaff frá 19?? við træsokkli. Myndir síggjast á www.123hjemmeside.dk/sofa
*Tlf. 522120*

**MADONNA!**
Hey, er nakar Madonnu-fjeppari har úti? Eg havi ein stóran flytikassa við »madonnu-tingum« – plakatir, videobond og mangt annað frá míni tíð sum madonnu-fjeppari, síðst í 80-unum og fyrst í 90-unum. Kann heinast fyri null krónur.
*Tlf. 511656*

**FLYMO**
330 til sølu fyri 400 kr.
*Tlf. 421789/218686*

**SOLARIUM**
til sølu (Sanwich) 24 rør, 1.000 kr.
*Tlf. 421789, mob. 218686*

**KOPARRØR TIL SØLU**
Koparrør 10 mm-103 cm.
1 stk. 4" rør gult, longd 2,07 cm.
1 stk. 4" rør grátt, longd 57 cm.
1 stk. 4" bend 45 gr.
2 stk. 4" bend 67 gr.
1 stk. 4" bend 15 gr.
1 stk. niðurløp. 1 stk. hvítt úr vask.
2 stk. T-rør, til vask, stødd 40 x 88,5 til sølu fyri 300 kr.
*Tlf. 271723, Klaksvík*

**HYGG HER**
Turt í munninum av kemo- ella stráluviðgerð? Sjøgren syndrom, sár í munninum ella aðrar munntrupulleikar? Royn Crassist munnskolievni.
*Tlf. 458330*

**NÚ ER EIN NÝGGJUR**
nethandil komin við fotopappíri ógvuliga høgari góðsku, við ótrúligalágum prísum. So tað er vert at byggja út á www.tpi-foeroyar.dk um onkur spurningur er, so ring
*272908*

**HOMEPARTY VIÐ TASKUM**
Ert tú í býi ella á bygd, eg fegin vil vísa tær taskudygd. So ring tí nú til mín, vit avtala nær eg skal koma til tín.
*Bjørghild, tlf. 312890/212890*

**LOPPUMARKNAÐUR**
Stórur loppumarknaður v/ kaffisølu verður í niðaru fimleikahøllini í Kommunuskúlanum leygardagin 12.02.05 kl. 10.00. Tikið verður ímóti lutum 11. februar kl. 19.00-21.00.
*Felagið arm- og beinbrek, tlf. 314567/321500*

**DYKKARAÚTGERÐ**
til sølu, er í góðum standi, selist samlað.
*Tlf. 228997*

# Grýlan tekur skap



*Seinasta føroyska grýlan doyði úti í Svínoy í 1956, men nú koma grýlur aftur á pall*

**Seinast í mánaðinum verður Grýlan framførd í Sjónleikarhúsinum í Havn. Hetta er eingin barnaleikur. Tvørturímóti**

**SJÓNLEIKUR**
*tíðindaskriv*

Tríggir menn og ein kvinna halda til í Sjónleikarhúsinum í Havn í hesum døgum. Tey venja ein nýggjan leik, ið er ein uppsetan av stuttsøguni Grylen eftir William Heinesen.

Leikurin, ið Bárður Persson hevur umsett og tikið stig til, verður frumframførdur 25. februar.

Tríggir leikarar - Bárður Persson, Finnur Jensen og Kjartan Hansen - eru knýttir at leikinum. Teir hava stovnað ein nýggjan leikbólk, ið hóskandi nevnist Willieboys.

Afturat sær hava teir fingið Gunnvá Zachariasen at leikstjórna. Hon býr í Danmark, har hon til dagligt er sjónleikari. Gunnvá Zachariasen hevur spælt nógvar uppsetanir eftir skaldskapi hjá Williami Heinesen og er nú komin til Føroyar at leggja teimum trimum lag á.

Tað er fyrst og fremst søgan og sjónleikarin, ið er miðdeplin í Grýluni. Sostatt er leikuppsetanin rættiliga einføld við fáum rekvisittum. Einum týdningarmiklum rekvisitti slepst kortini ikki uttanum, og tað er sjálvur grýluskorturin. Willieboys hava fingið fatur í svianum Torbjörn Alström - ein viðurkendur skortasmiðjur í norðurlondum - at gera ein góðan grýluskort.

Skorturin er gjørdur og komin til landið.

### Øðrvísi grýla

Grýlan, sum William Heinesen skrivar um, er ikki tann fitta lítla grýlan, sum vit kenna í dag:

»Stór er hon og andskræmilig, fjalir seg undir einum ørkymlandi forhangi av strýggjum og klútum. At hennara eygu lýsa í myrkri, eru tað mong, ið kunnu vitna um, men tað er eisini tað einasta, ið við vissu kann sigast um útsjónd hennara. Hvussu hon er háttað innan, veit eingin. Uttan Ungi Dunald... «

Brotið er tikið úr umsetingini av stuttsøguni, ið lýsir ein gamlan føstulávintssið, sum doyði út í Føroyum 1950-árunum. Talan var í veruleikanum um eitt slag av reinsilsisritual, ið stavar frá heidnari tíð. Á hvørjum ári gekk ein ávísur persónur grýla í bygdini. Grýlan segðist hava grøðielvandi megi og varð mett at vera eitt slag av fruktbarheitsgudi.

Seinasta føroyska grýlan doyði úti í Svínoy í 1956. Og tað er júst frá svínoyingum, sum minnast hesa seinastu grýluna, at William Heinesen fekk íblástur at skriva hesa rámandi stuttsøgu, ið lýsir Unga Dunald, ið hevur arvað ivasama heiðurin at ganga grýla á oynni á hvørjum ári. Dunald offrar seg fyri at halda bygdarsamfelagnum uppi. Stuttsøgan gevur eisini eina speiska lýsing av m.a. tí dømandi »missionerinum«, sum úrslitaleyst roynir at beina fyri ókristiligu grýluni.